

# Familjumøti í Vági

Sunnudagin 15. mars verður familjumøti í Meinigheitshúsinum í Vági. Seinastu tvey árini hava hesi familjumøti verði hildin einar 3 til 4 ferðir árliga, og hava hópin av fólki leitað sær innar. Hesaferð eru tað prestahjúnini úr Leirum í Hvalba, sum koma at hava familjumøti, sum byrjar kl. 17 og heldur á til umleið 17.45. Á skránni er stutt andakt, felagssangur og hugni. Eftir tað verður drekkamunnur á skránni.Meinigheitshúsið hevur júst fingið gjørt køkin av nýggjum, soleiðis at hesin er tíðarhóskandi, og sunnudagin verður so høvi hjá fólki at koma framvið og síggja hendan. Øll eru vælkomin á familjumøti sunnudagin í Vági, sum byrjar kl. 17.00. Av tí sama verður eingin sunnudagsskúli og møti, men alt verður lagt saman til tiltakið kl.17.00.



*Nýggja bedingin á Skála kostar út við 40 miljónir krónur, nú hon er um at verða liðug, og skjótt verður tikin alment í nýtslu*
*Mynd: Mest*

íløga í framtíðina, sigur Eyðfinnur Egholm.

Hann vísir á, at kostnaðurin av arbeiðnum, sum J & K Petersen hava gjørt, man snúgva seg um ein góðan triðing av samlaðu íløguni.

- Aftrat hesum kemur so stálarbeiði, sum man kosta tað mesta av einum øðrum triðingi og síðan restin, sum er vognar og ymiskar instalatiónir.

Eyðfinnur sigur, at stýringsskipanin, sum El-Service á Skála hevur staðið fyri, virkaði fyrstu ferð, sum hann tekur til.

- Jú, hetta sær spennandi út, og alt bendir á, at tað fer ikki at taka langa tíð at gera tær justeringar, sum skulu gerast, nú alt er nýtt.

Hann vísir á, at tá Nornagestur og Kolumbus fara av aftur bedingini eftir klassing, verða aftur uppmátingar og eftirlit gjørt, so enn betri greiða fæst á, at alt virkar, sum tað skal.

Nýggja bedingin á Skála kann taka skip upp, sum viga 1500 tons. Hetta er nøkur hundrað tons meira, enn gamla bedingin kláraði áður. Á skipasmiðjuni í Havn hevur Mest tvær bedingar, eina størri og eina minni. Hin minna kann taka skip upp, sum viga 1000 tons, og hin størra tekur skip, sum viga eini 2200 tons.

### 10% færri fólk

Vit kunnu skoyta uppí endan av hesi greinini, at umleið 225 fólk eru í starvi hjá Mest í løtuni.

Virksemið í samfelagnum hevur verið minkandi, og hesum hevur Mest eisini tikið avleiðingarnar av og hevur skert um talið av starvsfólkið við umleið 10% tilsamans.

- Millum teir, sum ikki eru hjá okkum longur, eru eitt nú 10 póllendingar, sum eru farnir heimaftur. Skeringarnar eru gjørdar til tess at laga fyritøkuna eftir virkseminum, sigur stjórin á Mest, Eyðfinnur Egholm.

# ABBA show á Summar Festivalinum

**Tey verða kallað besta ABBA síðani ABBA. Tey hava spælt á kendum spælistøðum í London, New York og í øðrum stórbýum kring heimin. Nú kemur tiltikna ABBA The Show til Føroya og kann upplivast á Summar Festivalinum**

SUMMARFESTIVALUR
*Tíðindaskriv*

ABBA fepurin er so høgur sum sjáldan. Ógloymandi sangirnir hjá svenska poppbólkinum standa sterkari enn nakrantíð. Filmurin Mama Mia! setti sølumet. ABBA-fløgurnar eru framvegis at finnast á hitlistunum, og fólk ferðast um høv og landamørk fyri at uppliva ABBA sangleikir.

Og nú er løtan komin, at føroyingar eisini fáa sítt heilt serstaka ABBA upplivilsi á palli.

Í august kemur tiltikna ABBA The Show til Føroya at framføra á Summar Festivalinum. Í ferðalagnum verða tveir tónleikarar, sum spældu við ABBA á sinni, og á palli er talan um eitt rimmar show, sum fer at rúnarbinda áhoyrararnar við teimum mongu hittunum hjá ABBA.

- Besta ABBA síðani ABBA, sigur offisiella fjepparafelagið hjá ABBA um ABBA The Show, og nú tá tað ikki longur ber til at uppliva upprunaligu ABBA á palli, so er hetta tað besta, sum kann bjóðast.



### Útseldar framførslur í stórbýum

ABBA The Show hevur ferðast kring heimin og spælt fyri túsundtals fólkum í teimum stóru býunum. Í sjálvasta Hollywood Bowl var útselt við 18.000 áhoyrarum. Sama var skilið, tá ið tey spældu í Royal Albert Hall í London.

Í oktober fer ABBA The Show á stóra konsertferð í Onglandi, har spælt verður í stórum hallum – millum annað á kenda Wembley Arena. Og verður skilið tað sama í Onglandi, sum tað var í Týsklandi í fjør, so verða høllirnar á tremur við fólki. Í Týsklandi vóru 75.000 atgongumerki seld til ABBA The Show í fjør.

Hetta eru bara nøkur av dømunum um, hvussu stórsligin hendan uppsetingin av klassikarunum hjá ABBA er.

### Mama Mia, ABBA livir!

Fyrsta framførslan hjá ABBA The Show var í 2001. Framførslan var í Noregi, og ummælararnir vóru um at detta á ein vissan likamspart av framførsluni.

- Mama Mia! ABBA er framvegis á lívi, skrivaði ein ummælari.

Ein annar ummælari segði seg vóna, at upprunaligu sangararnir í ABBA fóru at síggja hesa framførsluna, tí hetta kundu tey valla havt gjørt betur sjálvi.

Árini síðani hevur ABBA The Show verið á ferði víðahvar kring heimin, og fólk hava flokkast til teirra framførslur.

Nú er tíðin so komin, at føroyingar sleppa at uppliva hetta framúr flotta og stóra ABBA showið, og stóra uppsetingin av ABBA The Show verður gjørd á Summar Festivalinum í august.

Mama Mia, vit gleða okkum!

# Mess flytir út

UNGDÓMSBLAÐ
*Tíðindaskriv*

Ungdómsblaðið Mess flytur í nýggj høli á Niels Finsens Gøtu 22 í miðbýnum í Havn og lanserar í sama viðfangi nýggja ungdómsportalin mess.fo.

- Hetta skal víðka um okkara arbeiði og gera okkum sjónligari millum ung, sigur Rógvi Róin, stjóri í Mess Media, ið er fyritøkan aftan fyri Mess.

- Vit hava fingið nýggj skrivstovuhøli, har tað er pláss fyri øllum, og tískil kunnu vit á MESS nú vísa, hvørji vit eru: eitt gott ungsdómsblað, sum ung hava skrivað, fyri ung.

- Mess-skrivstovan verður opin mándag til fríggjadag frá klokkan 13.00 til 18.00. Og fyri at vit kunnu koma enn nærri at lesaraskaranum, og lesaraskarin kann koma nærri at okkum, lansera vit eisini heimasíðuna mess.fo. Vit flyta okkum frá at vera eitt ungdómsblað til eisini at vera ein miðdepil fyri føroyskan ungdóm.

- Mess.fo nøktar tørvin hjá bæði teimum yngru, ungu og eldru. Alt frá altjóða hendingum til kærleikstrupulleikar til tónleikatíðindi til ítrótt verður at lesa á henni. Síðan letur upp fyri speiskum og/ella stuttligum viðmerkingum frá brúkarunum á spildurnýggja blogginum. Okkara ungu, men dugnaligu blaðfólk fara eisini at krydda bloggin við evnum, sum kanska ikki hoyra heima í almennum dagsljósi, men heldur á myrka alnetinum. Harumframt vera heimagjørdir filmar og samtalur við bæði kend fólk og fólk á gøtuni at síggja á mess.fo, sigur Rógvi Róin frá.




Skrivstovan hjá Mess letur upp týsdagin 17. mars, sama dag sum nýggjasta blaðið kemur út. Mess.fo verður lanserað leygardagin 21. mars.